# Oljuboringin er byrjað

Í dag verður fyrsta stigið tikið til, at Føroyar broytist frá at vera ein fiskivinnutjóð burturav, til at Føroyar verður ein tjóð, sum hevur fleiri bein at standa á. Vit vita ikki um olja verður funnin ella ikki, men allir serfrøðingar á økinum eru temmiliga vísir í, at olja er at finna.

Í dag fer løgmaður Anfinn Kallsberg og landsstýrismaðurin í oljumálum Eyðun Eltør saman við pressunu út á boripallin Sovereign Explorer, sum liggur 130 kilometur suður úr Suðuroynni á økinum Marjum, beint við markið. Beint hinumegin liggja bretskir boripallap og pumpa olju upp.

Tað er so djúpt, har borað verður, at ein oljumaður samanbar tað við ein tannlækna, sum situr í einum stóli 100 metrar yvir sjúklinginum og borar í einum vísdómsjaksli.



# Lítið at telja hjá Westfreezer



Lítið hevur verið at sæð av hvali hjá línubátinum »Westfreeezer« úr Miðvági. Hann hevur seinastu vikurnar siglt við vísundafólki kring Føroyar fyri at telja stórhval. Vit hava ikki fingið nøkur tøl, men sagt verður at lítið hevur verið at sæð av hvali.

»Westfreezer« er inni nú, mikudagin lá hann á Havnini, men hann fer útaftur skjótt. Tað er Náttúrugripasavnið saman við útlendingum, sum hava leiðgað bátin, sum annars liggur úti og roynir við línu. Teir plaga at frysta umborð.

Báturin er leigaður alt summarið og ætlanin er at hann skal sigla víða. »Vestfreezer« er keyptur úr Noregi, tá æt hann »Frøyanes« og hoyrdi heima í Maaløy.

## Guard Vessel vanligari sjón

Mikudagin lá »Thor Chaser« skrásettur í Kingston, men við føroyskum eigarum á Havnini. Hesin bátur er ein fyrrverandi trolari, men hevur seinastu tíðina arbeitt sum vaktarskip í oljuvinnuni í Norðsjónum.

Alt fleiri føroyingar eru farnir at sigla við skipum sum tæna í oljuvinnuni. Talan er um hundrað tals manns og teir eru yvirmenn og einstakir kokkar eru eisini umborð.

Seinastu dagarnar hava fleiri skip í oljuvinnuni verið í Føroyum. Tey hava verið á Runavík.

## Stórur línubátur á Havnini

Mikukvøldið lá ein stórur norskur línubátur á Havnini. Talan er um »Nesbak« M-72-G frá Aalesund. Hetta er eitt nýtt slag av línubátum við stórum yvirbygningi og teir minna meira um eina ferju enn eitt fiskiskið.

Tað eru fýra dekk av høvuðsdekkinum og uppá brúnna. Omaná yvirdekkaða høvuðsdekkinum er aftur eitt dekk og omaná hesum er ein hædd við kømurum hjá yvirmonnunum og síðan kemur brúgvin.

Línubáturin er ein frystilínubátur og hann roynir undir Føroyum. Teir eru inni og umvæla onkran smálut og annars taka útgerð. Teir flestu norsku línubátarnir fara helst heim nú um stutta tíð. Teir plaga at nýta hásummarið til at fáa bátarnar á beding.

Norsku línubátarnir hava roynt út í eitt síðan á nýggjárinum og teir hava havt góðan fiskiskap. Teir royna serliga sunnanfyri Føroyar og vestanfyri á djúpari vatni enn føroyskir línubátar plaga at royna. Teir royna serliga eftir bromu og longu.

Brødrene Olsen
Eurovision Hit Band ▪ Pætur við Keldu
Vertur: Tróndur Djurhuus

Leygarkvøldið
4. august
Í Tórshavn á Hálsi kl. 21

Forsølan av atgongumerkjum:

Kunningarstovan, Tórshavn
Shell, Trongisvágur
Shell, Norðragøta
Statoil, Klaksvík
Kiosk Vár, Saltangará

Dyrnar lata upp kl. 20.00
Kostnaður: 190,-

Kyndil

Flogfelag Føroya · Føroya Tele · Föroya Bjór · Føroya Banki · Shell

